# Akvarium í Íshúsinum

**Hópurin, sum leitaði sær heim í nýggja akvariumið, var so stórur, at fyrireikararnir púrasta vórðu tiknir av bóli.**

ÓLAVSØKAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Rigmor Dam*



*Vakri búnin var eingin forðing, tá dýpið skuldi granskast.*



*Ein risastórur djúphavskrabbi hevur fangað ein hummara, sum var partur av framsýningini.*



*Hygg ein vakur krossfiskur*

Á ólavsøku lat fyrsta akvariumið í landinum dyrnar upp fyri almenninginum. Tað eru feðgarnir báðir, Bjørki og Dávid Geyti, sum hava tikið stig til verkætlanina, ið hevur til húsa í Íshúsinum á Argjum.

Bjørki Geyti sigur, at teir eru ovurhonds nøgdir við tiltakið, og hann metir at eini 2-3000 fólk vitjaðu í Íshúsinum.

– Vit høvdu lýst við, at opið var fríggjadag og leygardag millum klokkan 14 og 18. Men av tí, at so nógv fólk vóru inni, fingu vit ikki latið aftur fyrr enn um níggjutíðina á kvøldi, sigur Bjørki Geyti. Og hann avdúkar, at hann eisini lovaði nøkrum fólkum inn sunnudagin, og at knappliga vóru eini 300 fólk inni.

– Eg haldi at junglutrummurnar fóru í gongd og at fartelefonirnar hava gingið kykar hesa lítlu løtuna, sigur Bjørki Geyti.

– Og eg má enn einaferð gera vart við, at talan er bert um eina fyribils framsýning, og var endamálið í stóran mun at geva fólki eina fatan av, hvat er teimum í væntu, sigur Bjørki Geyti. Og hann sigur seg vóna, at akvariumið kann lata upp fyri almennum- og skúlavitjanum einaferð í heyst, tí tá skuldi verið nóg gott og fjølbroytt grundarlag verið fyri einari áhugaverdari og fjølbroyttari framsýning. Og hann roknar við, at tørvur verður á at tvey starvsfólk fara at starvast á akvariuminum burturav, og at onnur kunnu verða tikin inn, um tørvur er á tí.

– Vit hava atgongd til bát, so tað fer at bera til at flota hann við eitt nú skúlaflokkum, sum síðani kunnu arbeiða víðari við tí sum tey hava fanga, inni í akvariuminum, sigur Bjørki Geyti.

Hóast vitjanin á ólavsøku var ókeypis, so roknar Bjørki Geyti við, at fólk framyvir skulu rinda fyri at koma inn. Men at serstakar skipanir verða fyri bólkar og barnafamiljur.

– Men væntandi fara vit framyvir at gera tað ókeypis á ólavsøku, tí tað er ein góður háttur at marknaðarføra verkætlanina, sigur Bjørki Geyti.

## Góður faldari

Í faldaranum, sum fólk kundu fáa sær á framsýningini, hava fyriskipararnir greitt frá um verkætlanina, og vit prenta burtur úr henni her:

Í nógvum førum hava tankar verið frammi, um at seta á stovn eitt akvarium í Føroyum. Biofar verkætlanin var gróðrarbotnur fyri einari rúgvu av spennandi granskingar verkætlanum. Ein tanki, sum búnaðist í sambandi við Biofar verkætlanina, undir leiðslu av Arna Nørrevang, var tankin um eitt akvarium í Føroyum. Royndir vórðu gjørdar í kjallaranum í fiskahúsinum í Kaldbak, og áhugin fyri hesum smáu roynd um var ómetaliga stórur. Síðst í 90'unum var ætlanin at byggja eitt stórt akvarium á Sandágerði í sambandi við eina saman-





*Í stóra akvariuminum, sum stendur fram við vegginum, eru skeljadjór, krabbar, plantur og hýsur.*